# Kunnu vænta at arbeiðsfólk fara at krevja lønarhækking

**Arbeiðarafeløgini fara nú at tosa saman um, antin tey skulu samráðast saman, ella ikki**

SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Bæði Ingeborg Vinther og Hans Joensen vænta, at lønarhækking verður eitt av krøvunum til arbeiðsgevararnar*

– Tað er væntandi, at vit eisini fara at krevja meiri í løn.

Tað spáa bæði Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag og Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, nú samráðingar skulu verða við arbeiðsgevararnar um nýggjar sáttmálar.

Ingeborg Vinther, Hans Joensen, Hanna Isaksen, forkvinna í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag, siga øll, at tey fýra feløgini nú fara at tosa saman um, hvussu samráðingarnar skulu skipast og um tey skulu samráðast saman, ella hvør í sær.

Kortini sigur Hans Joensen, at eftir hansara tykki heldur hann at tað er frægast at øll feløgini samráðast saman.

Undir øllum umstøðum væntar hann, at Havnar Arbeiðsmannafelag og Føroya Arbeiðarafelag fara at samráðast saman.

– Vit hava eitt gott samstarv og eg vænti fyri heilt vist, at í hvussu so er hesi bæði feløgini fara at samráðast saman, sigur hann.

Men hann leggur stóran dent á at fáa øll feløgini at samráðast saman fyri at vinna verkafjøldini so góðar umstøður sum gjørligt.

– Tað er altíð betri, at øll feløgini draga eina línu og tí er tað best, um øll samráðast saman, leggur hann afturat.

Tá ið feløgini nú fara at tosa saman, fara tey eisini at umrøða, hvørji krøv skulu setast til arbeiðsgevararnar, nú samráðingarnar verða.

Tí vilja tey ikki siga nakað um krøvini enn, men bæði IngeborgVinther og Hans Joensen vænta, at lønarhækking verður eitt av krøvunum.

Men hvussu stórt kravið verður, kann hon ikki siga nakað um.

### Ger ikki støðuna veikari

Hvørki Ingeborg Vinther ella Hans Joensen halda, at tað fer at gera samráðingarstøðuna hjá arbeiðafeløgini veikari, at Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag ikki hevur tikið hevur sagt sáttmálan upp.

– Eg haldi at tað er óheppið at arbeiðsmenninir í Klaksvík ikki siga sáttmálan upp, men eg haldi ikki, at tað ger okkara støðu veikari, sigur Hans Joensen.

– Arbeiðsmannafelagið í Klaksvík eigur sjálvt avgerðina um, at teir ikki vilja siga sáttmálan upp. Men eg haldi, at tað er óheppið, at teir ikki skulu fáa somu ágóðar, sum øll hini arbeiðsfólkini í landinum fáa. Men tá ið teir ikki vilja stríðast fyri ábótum á sáttmálanum, kunnu teir heldur ikki krevja nakað.

Ingeborg Vinther er samd. Hon sigur, at arbeiðsmanninir í Klaksvík hava fullan rætt at halda at sáttmálin er so góður, at ongar ábøtur eru neyðugar og at alt er gott, sum hon, málber seg.

Men hon heldur ikki, at tað ger samráðingarstøðuna hjá hinum feløgunum veikari.

Hon hevur fyrr sagt, at hon heldur at tað er rætt, at sáttmálarnir verða sagdir upp, tá ið skeiðið er úti, tí tað eru altíð ábøtur, sum eiga at verða gjørdar, bæði lønarútreiðslur, men eisini ábøtur, sum ikki kosta so nógv.

# Støðan hjá Arbeiðsmannafelagnum í Klaksvík ger arbeiðsgevarar sterkari

**– Vit hava lagt okkum boðskapin frá Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag í geyma, sigur stjórin í Vinnuhúsinum**

SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Fyri hvørt oyra, sum lønir hækkar, ger tað støðuna uppaftur verri, sigur Jan Mortensen*

– Tað er greitt, at tað ger okkara støðu sterkari, at Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag ikki sigur sáttmálan upp.

Tað heldur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum og oddamaður hjá arbeiðsgevarunum í sáttmálasamráðingunum, sum verða við arbeiðarafeløgini í næsta mánaði.

– At Arbeiðsmrnninir í Klaksvík ikki siga sáttmálan upp, merkir, at tað er eitt felag, sum vil halda fram við sama sáttmála og sum fer at arbeiða sum vant, sama, hvar hendir í samráðingunum við hini feløgini.

Og tað styrkir støðuna hjá arbeiðsgevarunum, sigur Jan Mortensen, uttan at hann tó ætlar at yvirtulka samráðingar longu nú, áðrenn tær eru byrjaðar.

Hann sigur, at hann hevur lagt sær boðskapin frá Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag í geyma.

Og boðskapurin er, at sum tíðirnar í fiskivinnuni eru nú, er hetta ikki stundin at krevja meiri í løn.

Annars vónar Jan Mortensen, at arbeiðarafeløgini fara at samráðast saman,tí tað er lættari at samráðast við ein part enn við fleiri partar.

– Men tað er ein avgerð, sum arbeiðarafeløgini mugu taka og vilja tey samráðast hvør sær, er tað eisini ílagi, leggur hann afturat.

Annars heldur hann, at støðan í fiskivinnuni er sera vánalig.

– Fiskivinnan er lønartung og tað er ein spurningur, um hetta slagi av vinnu hevur nakra framtíð í okkara parti í heiminum, sigur Jan Mortensen.

Og fyri hvørt oyra, sum lønin hækkar, ger tað kappingarførið uppaftur verri, leggur hann afturat.

# Arbeiðsmenn í Klaksvík standa einsamallir

**Øll arbeiðarafeløgini, uttan Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, hava nú endaliga avgjørt at siga sáttmálarnar við arbeiðsgevarnar upp**

SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR
*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er nú greitt, at fýra av teimum fimm arbeiðarafeløgunum í landinum, fara at siga sáttmálarnar við arbeiðsgevararnar upp.

Freistin at siga sáttmálan upp er í dag. 1. mars og bæði Føroya Arbeiðarafelag, Arbeiðsmannafelagið í Havn og Arbeiðskvinnufelagið í Havn og Arbeiðskvinnufelagið í Klaksvík, hava nú sent arbeiðsgevarunum boðini um, at tey siga sáttmálan upp.

Tað er langt síðani, at Føroya Arbeiðarafelag gjørdi av at siga sáttmálan upp.

Ingeborg Vinther hevur fyrr sagt, at hon heldur at tað er rætt at siga sáttmálan upp, tí tað eru altíð ábøtur, sum kunnu gerast í sáttmálanum.

Á aðalfundinum í Havnar Arbeiðskvinnufelag leygardagin, varð samtykt at siga sáttmálan upp. Í Havnar Arbeiðsmannafelag hevur tað leingi verið ætlanin at at siga sáttmálan upp og á aðalfundinum fyri eini viku síðani, tóku limirnir einmælt undir at siga hann upp.

Í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag fekk nevndin heimild at siga sáttmálan upp, og tað hevur hon gjørt.

Tí er tað greitt, at samráðingar skulu verða ímillum Arbeiðsgevarar og tey fýra arbeiðarafeløgini í apríl um nýggjan sáttmála.

Sostatt er tað eisini greitt, at Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag kemur at standa einsamalt við síni avgerð um ikki at siga sáttmálan upp.

Tað er ikki avgjørt enn, hvussu samráðingarnar verða skipaðar, ella um feløgini fara at samráðast saman ella ikki.